# Fróði høgt í metum millum fjølmiðlafólk

**Fróði Holm Knudsen er næstbesta fjølmiðlafólk í Danmark sambært fjølmiðlalesandi**

FJØLMIÐLAR
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

- Eg eri bæði bilsin og rørdur, og eg kenni tað sum ein stóran heiður at fáa eitt tílíkt herðaklapp.

Tað sigur føroyski fjølmiðlamaðurin Fróði Holm Knudsen, ið hevur fingið prógv um, at hann er høgt í metum í Danmark. Sambært eini kanning, sum Háskúlin í Volda í Noregi hevur kunngjørt, er Fróði nevniliga millum best umtóktu fjølmiðlafólkini í Danmark.



*Fróði Holm Knudsen, ið hevur starvast á BT í mong ár, er næstbesta fjølmiðlafólk í Danmark sambært fjølmiðlalesandi*
*Mynd: Niels Uni Dam*

### Beinrakin og bersøgin

Í kanningini, sum er liður í eini felags norðurlendskari kanning av fjølmiðlaútbúgvingum, eru øll fjølmiðlalesandi í Danmark biðin um at peika á teirra yndisfjølmiðlafólk í Danmark. Úrslitið vísir, at Fróði Holm Knudsen – eins og Lars Fogt – liggur á einum flott- um øðrum plássi. Best umtókta fjølmiðlafólkið er Ulla Terkelsen.

- Ein orsøk kann vera, at eg skrivi rættiliga beinrakið. Eg eri bersøgin, og tað sæst aftur í mínum greinum, sigur Fróði Holm Knudsen, sum í mong ár hevur starvast á á kulturredaktiónini hjá danska blaðnum BT.

### Hugburðsbroyting

Hann leggur afturat, at heiðranin staðfestir eina hugburðsbroyting millum danir, hvørjum fjølmiðlum viðvíkir.

- Ofta verður sagt, at ítróttur og undirhald ikki er »orduligur« journalistikkur. Men rákið seinastu árini vísir, at tey meiri »seriøsu« bløðini hava flutt seg frá tí turrisliga tíðindaflutninginum og nærkast tí journalistikki, sum BT og onnur tabloid-bløð standa fyri. Tí er eyka hugaligt at staðfesta, at eisini fjølmiðlalesandi – tað vil siga framtíðar journalistarnir – hava sama hugburð, vísir Fróði Holm Knudsen á.

### Aftur á skúlabonk

Fróði Holm Knudsen hevur serliga fingist við at skriva um danska og altjóða undirhaldsheimin. Hann er kendur fyri sínar bersøgnu og erligu samrøður við altjóða tónleika- og filmsstjørnur, so sum Elton John, Madonna og Ricki Martin. Her heima er hann kanska mest kendur fyri sítt arbeiði í Friðarboganum, har hann eitt skifti var formaður.

Fróði Holm Knudsen segði seg herfyri úr starvinum á BT og hevur ístaðin valt at lesa enskt á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Kortini hevur hann ikki lagt pennin frá sær. Hann arbeiðir free lance, og í næstum verður farið til Suðuramerika at gera samrøður við menninar, sum yvirlivdu kendu flogvanlukkuna í 1972 í Andesfjøllunum. Vanlukkan, har ferðafólk vórðu noydd at eta mannakjøt fyri at yvirliva, er gjørd til film. Hann eitur Alive.

Tjarnargarður

Nýggi parturin av Tjarnargarði verður væntandi liðugur í september.
Tá fer Tjarnargarður at kunna hýsa 34 búfólkum. Í løtuni er talið 10.

Tjarnargarður verður býttur í triggjar eindir.
Í tveimum eindum verða 12 búfólk. Tann gamli parturin, sum hýsir 10 búfólkum, verður gjørdur til eina eind fyri búfólk við Alzheimer/demens.

Vit arbeiða eftir hugsjónini »The Eden alternative«, har tørvurin hjá búfólkunum er avgerandi fyri, hvussu arbeiðslagið skal skipast. Tað krevur, at starvsfólk arbeiða eftir øðrvísi hugburði enn vanligt hevur verið, tá arbeitt hevur verið við føstum rutinum. Vit hava djór, plantur og barnavitjanir, so heimið gerst eitt livandi stað til gleði fyri búfólk, avvarðandi og nærumhvørvið.

Ynskiligt er, at starvsfólkini eisini hava áhuga fyri ítrivi og tiltøkum, so tey saman við búfólkum og avvarðandi skapa trivnað í heiminum, so her verður gott at vera.

Arbeitt verður tvørfakligt, og dentur verður lagdur á persónligar og fakligar eginleikar.

Starvsfólk til Tjarnargarð

Søkt verður eftir
- deildarleiðara
- varadeildarleiðara
- sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum
- heilsuhjálparum

Eisini verður søkt eftir
- fólki til reingerð og vaskarí
- fólki til matgerð (evt. kokkur) við ábyrgd fyri vøruinnkeypi o.s.

Førleikakrav:
Umsøkjarin skal hava:
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- áhuga og/ella eftirútbúgving í demens
- góð samstarvsevni
- gott yvirlit og megna at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum

Vit bjóða:
Eitt venligt arbeiðsumhvørvi, har øll kunnu gera sína ávirkan galdandi, og atlit verða tikin til umstøðurnar hjá hvørjum einstøkum, um tað er gjørligt.

Setanarviðurskifti:
Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita
um starvini við at venda sær til Heðin Einarsson, leiðara,
ella Helenu Poulsen, varaleiðara, á tel. 302875.

Umsókn
saman við prógvi, CV og møguligum ummælum, skulu vera
Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn,
í hendi í seinasta lagi 20. august 2007.